# Sandavágur í vøkstri



*Árið í fjør royndist hampiliga væl fíggjarliga hjá Sandavágs Kommunu. Skattainntøkan var umleið eina hálva millión hægri enn mett, og fleiri fólk búðu í Sandavági við ársenda, enn tá árið byrjaði, sigur Rósa Samuelsen, borgarstjóri í Sandavági*

**Tað búðu 34 fólk fleiri í Sandavági við ársenda í fjør, enn árið fyri, og væntandi fara enn fleiri fólk at flyta til Sandavágs, nú undirsjóvartunnilin er veruleiki. Skattainntøkan hjá kommununi var í fjør hægri enn mett**

KOMMUNUTÍÐINDI
*Orð og myndir*
*Edvard Joensen*

**Sandavági:** Hóast tað ikki beinleiðis kann leggjast undirsjóvartunlinum til, hevur hann ivaleyst sína ávirkan á, at fólkatalið í Vágum er vaksandi. Sandavágur er ein av bygdunum, har fleiri fólk hava biðið um grundstykki, og onkur nýggj hús eru loigu komin upp at standa.

Í Sandavági búðu 723 fólk á nýggjárinum, sigur Rósa Samuelsen, borgarstjóri í Sandavági. Tað eru 34 fók fleiri enn við ársenda 2001. Av hesum eru 30 tilflytarar, meðan burðaravlopið, munurin millum fødd og deyð í bygdini, var 4 fólk.

Rósa Samuelsen letur hampiliga at fíggjastøðuni hjá kommununi. Meira er til, enn kommunan skyldar, so tað skuldi sum so verið í lagi, heldur hon.

Skattainntøkan hjá Sandavágs Kommunu royndist betri í fjør, enn væntað var við ársbyrjan. Metingin á fíggjaætlanini var góðar 12,9 milliónir, meðan endaliga úrlsitið vísti knappliga 13,5 milliónir ella ein hálva millión meira enn mett. Í ár hevur Sandavágs Kommuna mett at fáa góðar 12 milliónir krónur inn í skatti. Fíggjarlógin hjá Sandavágs Kommunu fyri árið 2003 javnvigar við reiðiliga 14,6 milliónum krónum.

## Veganøvnini

Sum allar aðrar bygdir og býir í landinum, skal Sandavágur eisini hava gøtunøvn og nummar á hvørt hús. Hetta verður gjørt eftir ynski frá Postverkinum.

Í Sandavági hevur sitið ein gøtunavnanevnd, sum hevur latið frá sær sítt uppskot til nøvn, og er har tikið atlitt til gomul staðarnøvn í bygdini. Bæði vanlig staðarnøv og ikki minst søgulig nøvn, sum bæði verða knýtt at støðum og persónum.

Nevnast kunnu mætir menn sum V.U. Hammershaimb og Peter Arreboe, sum báðir hava fingið hvønn sín veg uppkallaðan eftir sær í Sandavági. Annar varð føddur í bygdini, og hin doyði har.

Sandavágs Kommuna hevur eisini fingið kort yvir bygdina lagt út á internetið. Skipanin kann síggjast á heimasíðuni hjá Sandavágs Kommunu, sum vísir til skipanina www.kort.fo. Heimasíðan hjá Sandavágs Kommunu eitur www.sandavagur.fo

Landsvegurin víðari vestur gjøgnum oynna, liggur gjøgnum Sandavág, og merkist tað eisini. Arbeitt hevur støðugt verið við at bøta um trygdina á hesum vegastrekki, sigur Rósa Samuelsen, borgarstjóri í Sandavági.

Hon nevnir í hesum sambandi, at fleiri ljós verða sett upp inn eftir Leitinum, sum er vegurin millum bygdina sjálva og Giljanes, har skúlin er. Eisini er avtalað gjørd um kavarudding á gonguteiginum fram við hesum vegnum, tá brúk er fyri tí.

At tað mangla bussskýli fram við høvuðsvegnum, sanna tey dagliga, sum hvønn dag ferðast við bussi av oynni til arbeiðis. Men hetta verður nú bøtt um, sigur Rósa Samuelsen, eins og tað eisini verður arbeitt við at betra um parkeringsviðurskiftini fram við høvuðsvegnum.

Tann søguligi Gamli Skúli í Sandavági verður enn nýttur til fyrsta og annan flokk, og har hava verið gjørdar rímiliga stórar ábøtur. Og meira er eftir at gera, sigur borgarstjórin. Onkur leki er, so nú verður farið undir at klæða Gamla Skúla við timbri fyri á tann hátt at sleppa undan lekanum.

Nýggja útstykkingin norðuri í Sørpum er um at vera liðug, og fyrstu húsini eru komin upp at standa, og onkur er fluttur inn.

Sandavágs Kommuna hevur valt at gera alt liðugt, áðrenn rættiliga verður fairð undir bygging á økinum. Eitt nú gøtuljós og asfaltering eru gjørd, so fólk ikki koma til ein hurlivasa, tá tey flyta í nýggj hús. Enn er tó eftir at asfaltera sjálvar gonguteigarnar har norðuri og gera gøtur, sum binda nýggja býlingin saman við gomlu bygdina, sigur borgarstjórin. Higartil hevur hendan útstykkingin kostað góðar fýra milliónir krónur.

## 2003

Nógv er gjørt, men meira er eftir. Og ætlaninar fyri árið í ár eru ikki smáar heldur.

Dagstovnurin, sum bygdur verður, skal takast í brúk í vár, og verður tað stórt framstig á tí økinum. Væntandi fara eini 12 fólk at arbeiða á dagstovninum, sum bæði fer at hýsa vøggustovu- og barnagarðsbørnum.

Grivið varð víða í Sandavági í fjør. Kloakkir og veitingar til bæði vatn og streym vórðu lagdar av nýggjum, og hetta fer at halda fram í ár eisini, sigur borgarstjórin. Væntandi verður ikki komið runt í ár kortini.

Tann í síni tíð so nógv umtalaði sløkkiliðsbilurin er keyptur, og kemur væntandi í ár. Nú er tað ikki Sandavágs Kommuna, sum einsamøll eigur bilin. Sandavágur og Miðvágur hava felags sløkkilið, og tað er hetta liðið, sum fær bilin. Kostnaðurin verður tó enn meira býttur, tí umframt at kommunurnar báðar fara at gjalda helvtina av tí, bilurin kostar, ber partafelagið Vágatunnilin hina helvtina av kostnaðinum.

Fyri nøkrum árum síðan varð nýggj brimverja gjørd á Sondum, og hevur hon vart væl. Í so væl, vilja tey halda, tí hon hevur eiisni gjørt tað, at tað, sum skal renna út á sjógv, steðgar á og ger skaða á hús í grannalagnum.

Mataráin hevur volt nakað væl av vatnskaða, og verður hetta roknað at koma av, at frárenslið undir brimverjuni er typt.

Neyðugt verður tí at taka partar av brimgarðinum upp og gera frárenslið av nýggjum. Hetta verður gjørt í vár og summar, sigur Rósa Samuelsen.

Í ár er Sandavágur stevnubygd. Vestanstevnan verður hildin í Sandavági um miðjan juli, og væntandi koma nógvir stevnugestir. Umframt gestirnar heiman av landi koma nógvir íslendingar á vitjan í summar. Tað eru fólk úr vinarbýi Sandavágs á Eysturlandinum, Neskaupstaði, sum koma á vitjan í ár. Vitjað hevur trúliga verið millum bygdirnar í nógv ár, og í ár hava íslendigar ætlað at gjørt nógv burtur úr at fara til Føroya.

– Í Sandavági eru vit farin undir at fyrireika okkum til at taka í móti øllum gestunum, sum væntandi eru til bygdar í summar, við at fríðka um bygdina, sum vit kunnu best, sigur Rósa Samuelsen, borgarstjóri í Sandavági.



*Trupulleikar hava verið av, a t frárenslið undir grótkastinum er typt, og vatnskaði hevur staðist av. Í vár verður hol sett á garðin, og nýtt frárensl lagt, áðrenn grótið so verður lagt aftur*



# Føroyskt sjónvarp til føroyingar í Danmark

**Føroya Hornið er heitið á sending, ið føroyingar og danir, sum hava ávíst tilknýtið til Føroyar eru farnir undir við at senda í høvuðsstaðarøkinum**

SJÓNVARP
*Ingrid Bjarnastein*



*Føroya Hornið er heitið á sending, sum føroyingar saman við dønum við tilknýtið til Føroya, gera. John Rigelsen er framleiðari og er hann her avmyndaður saman við Kim Bay, chefteknikara*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Sjónvarp til føroyingar búsitandi í Danmark. Nú er tað komið. Føroya Hornið er heitið á sending, sum nakrir føroyingar saman við dønum, ið hava ávíst tilknýtið til Føroya, eru farir undir at senda.

Føroya Hornið verður sent tvær ferðir um mánaðan á Kanal København. Talan er um tvær sendingar á 27 minuttir hvør, sum innihalda Barnahornið, kirkjuhornið og ymiskt tilfar, sum hevur við Føroyar at gera.

– Vit meta, at tað eru eini 25.000 føroyingar, ið kunnu síggja okkara sendingar. Og okkara samlaða hyggjaratal er umleið 2,5 milliónir møguligir hyggjarar, sigur John Rigelsen, sum er ein av teimum, sum ger sendingina Føroya Hornið.

John er sjálvur giftur við føroyskari konu, og er hansara áhugi fyri landinum stórur.

– Vit vilja geva teimum føroyingunum, sum búgva í Danmark nakað at hyggja eftir. Seinastu seks mánaðarnar hava vit verið í Føroyum minst einaferð um mánaðan og í summar ætla vit at gera eina fasta redaktión her, sum kemur at ferðast kring landið, greiðir John frá.

## Kostnaðarmikið

Tað er ógvuliga kostnaðarmikið at framleiða sjónvarp. Vanliga kostar ein minuttur 15.000 krónur at senda, men í serligari avtalu, er prísurin vorðin til 40.000 krónur um mánaðan fyri tvær sendingar á 27 minuttir.

Føroya Hornið sæst í høvuðsstaðarøkinum, og ein partur av teimum, sum búgva á Malmö, síggja eisini sendingina.

– Við hjálp av stuðlum hava vit fingið stáplað sendingina á beinini, sigur John.

Stuðlarnir hjá sendingini eru Atlantic Airways, Smyril Line, Töting, Postverk Føroya, Sirri og Hotel Hafnia, men leggur John dent á, at tað er væl pláss fyri fleiri stuðlum.

Sendingarnar verða sendar annan hvønn leygardag og annan hvønn fríggjadag. Leygardag verða tær sendar fyrrapartar og fríggjadagar um kvøldið.

– Tað, sum vit senda, eru føroysk innsløg. Málið er bæði føroyskt og danskt.

Skipað varð fyri tíðindafundi á Hotel Hafnia týsdagin, og vóru har eisini umboð fyri teir ymsu stuðlarnar.

# Prix forsmakkur í Gøtu

**Leygarkvøldið var konsert í Gøtu við Mary´s Baby, Bracket og Mind´s Eye. Mary´s Baby og Bracket skulu vera við í triðja innleiðandi umfari av Prix Føroyum leygarkvøldið, men Mind´s Eye hevur longu tryggjað sær pláss í hálvfinaluni tann 15. mars**

UMMÆLI
*Ingrid Bjarnastein*

Áskoðararnir, sum høvdu leitað sær til Gøtu leygarkvøldið, kundu vænta sær ein rættiligan forsmakk av komandi Prix umfarið, tí ikki minni enn triðingurin av bólkunum, sum vera við í triðja innleiðandi umfarið fóru á pall í Losjuni í Gøtu.

Losjan í Gøtu er ikki so rúmlig, so skjótt fyltist. Heilt fitt av fólkið hevði leitað sær til Gøtu hetta kvøldið, og veðrið var av tí besta.

Vegna tekniskar trupulleikar var konsertin eitt sindur seinkað, men hetta forðaði ikki fyrsat bólkinum, Mary´s Baby, at leggja í vaðið um hálvgum ellivu tíðina.

Mary´s Baby verður við í triðja innleiðandi umfari til Prix Føroyar komandi leygarkvøld. Bólkurin legði út við einum instrumentalum lagi. Tónleikarnar kenna vit aftur frá bólkinum Marygold, sum var við í Prix Føroyum, fyri tveimum árum síðani. Nýggju andlitini í bólkinum er keyboardspælarin og sangarindan. Báðar konufólk, og er hetta nakað heilt serligt í Prix høpi.

Mary´s Baby spældi ein blanding av Cranberries-Kent tónleiki. Sangarindan, Olivia Mikkelsen, minti ikki sørt um forsangarinnuna í írska bólkinum The Cranberries, Deloris O’Riordan. Bólkurin var væl samanspældur, og bæði sást og hoyrdist tað, at tónleikararnir hava spælt saman í eina góða tíð nú.

Tað einasta, sum kanska var til at fílast á er, at harða gittarljóðið ofta hevði hug til at doyva vøkru forsangararøddina, og kundi tað til tíðir tykjast ikki sørt ørkymlandi.

## Mind´s Eye rokkaði

Annar bólkurin á palli hetta kvøldið var ungu eysturoyar bólkurin, Bracket. Teir spæla harðan andaligan tónleik. Sangari í bólkinum er Andrias Højgaard, sum gjørdist nummar tvey til ársins songrødd í 2001. Gittarleikaran kenna vit millum annað eisini frá I Am, og er hann Arni Zachariassen. Eisini Bracket verður við í triðja innleiðandi umfari í Fuglafirði leygardagin.

Bracket megnaðu ikki eins væl og Mary´s Baby sína uppgávu. Røddin sveik sangaran av og á, eins og ljóðið viðhvørt kundi tykjast eitt sindur ov hart.

Gittarleikarin megnaði tó at fullføra sína uppgávu til fulnar. Allir sangirnir høvdu langar gittarsolo´ir, har Arni veruliga slapp at royna seg, og prógvaði hann, at gávurnar eru uppá pláss.

Seinasti bólkurin á pallinum hetta kvøldið fær besta ummæli. Mind´s Eye, sum tók øll á bóli í øðrum umfari av Prix Føroyum, var komin úr Klaksvík fyri at spæla.

Tað fyrsta bólkurin gjørdi var at fáa øll at reisa seg upp, so eitt sindur av lívi kundi koma í Losjuna. Og tóku áskoðararnir eisini væl undir við bólkinum, tí salurin kókaði so skjótt bólkurin fór í gongd.



*Mind´s Eye rokkaði í Losjuni í Gøtu leygarkvøldið, tá tónleikasamtakið Grót skipaði fyri konsert. Bracket og Mary´s Baby vóru eisni á palli hetta kvøldið*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Vælsamanspældir og ongir feilireyðmerktu klaksvíksbólkin. Stílurin, sum er yvir í Korn-Linkin Park, fall áhoyrarunum væl í oyrað, og ta einu løtuna var ikki nógv annað at síggja enn hár, sum varð rist upp og niður at síggja.

Mind´s Eye var bólkurin, sum kom best frá síni uppgávu hetta kvøldið. Onkur vildi vera við, at tónleikurin teir spældu, er framtíðin í føroyskum tónleiki. Men staðfestast kann í øllum førum, at Mind´s Eye hevur fingið eitt væl uppiborið pláss í hálvfinaluni í Prix Føroyum. Hvat teir tá hava at bjóða, er bara at bíða eftir.